

## Starv á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum dugnaligum fólki til íbúgvahagtøl og arbeiðsmarknaðarhagtøl.

Arbeiðið umfatar bæði rakstur av verandi hagtalsskrá og menning av nýggjum hagtølum um evnini. Nýggju verkætlanirnar fara fram í samstarvi við KT deildina á stovninum.
Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, og tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

**Førleikar**
Talan er um fulltíðarstarv, sum krevur analytiskar førleikar, akademiska ella tilsvarandi útbúgving og gott KT skil.
Vit seta tær onga formliga treyt um serliga útbúgving, men gera kortini vart við, at vit hava tørv á væl lærdum og dugnaligum fólki.

- Akademisk útbúgving í hagfrøði ella samfelagsfrøði er ein fyrimunur.
- Góð evni til KT er eisini fyrimunur.

Vit rokna við, at rímiliga rúm tíð fer til at læra stovnin og arbeiðslagið at kenna, at læra um hagtøl og um nýggju uppgávurnar. Tað vit bjóða tær, er eitt áhugavert starv, í samstarvi við dugnaligar og væl vitandi starvsfelagar.

**Umsókn**
Lønin er sambært galdandi sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi fakfelag.
**Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. august** og kann bæði sendast sum teldupostur og vanligt postbræv.

Vilt tú hava meira at vita um størvini og møguleikarnar, ring so á Hagstovuna – 352800 – og bið um at tosa við Jógvan Bærentsen (fartel.: 581878) ella Hermann Oskarsson (fartel.: 225038).

SENDISTOVAN

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX + 298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

# LANDSSKJALAVØRÐUR

Við hesum verður starvið sum landsskjalavørður lýst leyst at søkja til setanar frá 1. september 2008.
Starvið er tíðaravmarkað fram til 1. januar 2011.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá landsskjalavørðinum er at vera stjóri á Føroya Landsskjalasavni, sum er stovnur undir Mentamálaráðnum og hevur til endamáls:

- at tryggja varðveitingina av savnindum (skjølum), ið hava søguligt virði og/ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar
- at gera tað møguligt at vraka savnindi, ið ikki eiga at verða varðveitt
- at ráðgeva myndugleikum í journal- og arkivspurningum
- at umsita arkivavtaluna millum landsstýrið og danska statin
- at hava savnindi tøk hjá myndugleikum og almenningi
- at veita granskarum og almenningi ráðgeving og savnstænastur
- at inna gransking í tilknýti til søvnini

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at ein hevur lokna akademiska útbúgving í søgufrøði ella hevur akademiska útbúgving frá lærdum háskúla, ið kann metast at geva fakligan førleika at røkja starvið. Fyrimunur er at hava leiðsluroyndir og kunnleika til savnsarbeiði og at arbeiða við skjølum. Fyrimunur er eisini at hava granskingarroyndir í søguvísindum ella øðrum javnlíkum vísindum.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Væntandi verða bygnaðarbroytingar á savnsøkinum komandi árini, og talan er tí um tíðaravmarkað starv fram til 1. januar 2011. Tann, ið fær starvið, má eisini góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við bygnaðarbroytingarnar.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við onnur søvn og aðrar stovnar og myndugleikar.

**Fleiri upplýsingar**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Martin Næs, deildarstjóra, tel. 355050 ella 555040 fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til Mentamálaráðið, Postrúm 3279, 110 Tórshavn ella til mmr@mmr.fo.

Umsóknir skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 18. august 2008 kl. 15.00.

SENDISTOVAN

*Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru málsøki viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Føroya Landsskjalasavn er stovnur undir Mentamálaráðnum.*
*Høvuðsendamálið hjá Landsskjalasavninum er at savna, varðveita, skipa, lýsa og røkja søguligar keldur. Harafturat hevur Landsskjalasavnið til endamáls at vegleiða stovnar, hvussu teir skipa og avhenda savnindini. Á Landsskjalasavninum starvast 6 fólk, og harafturat eru 12 fólk í løtuni verkætlanarsett. Sí meira á www.lss.fo.*

Mentamálaráðið